Kirkjur í Havn

Nær verður Havnin kirkjubygd!

Foto: Kalmar

Havnar kirkja í dag

— [illegible] dugi ikki at siggja, at [illegible]ð er til hindurs fyr[illegible] Havnin, sæð frá ein[illegible]rkjuskipanar- ella søg[illegible]m sjónarmiði, er vo[illegible]kjubygd líka so tið[illegible] nógvar aðrar by[illegible]gði Petur Martin [illegible]ssen í fyrilestri, ha[illegible] Havnar kirkju ty[illegible] samband við at [illegible] kirkja fyllir 200 ár.

P[illegible]Martin helt fyri, at [illegible]t ikki vita um kirk[illegible]avn eldri enn 160[illegible]nnast beinleiðis próp[illegible], at Havnin er eldr[illegible]bygd enn 1609 og n[illegible]ann, at kirkjan møg[illegible] hevur staðið úti á Re[illegible]

Vi[illegible]enta fyrilesturin hjá P[illegible]ur Martin Rasmussen: [illegible]ær verður Havnin kirkj[illegible]ygd!«

Upp á henda spurningin kunnu vit svara beinanvegin, at tað vita vit ikki, líka so lítið sum vit vita tað um nakra aðra kirkjubygd í Føroyum, uttan kanska Skúvoy, um vit kunnu líta á Føroyingasøgu, sum nevnir, at kirkja er har. Tá Føroyingasøga nevnir hetta og ikki nakra aðra kirkju, kundi tað bent á, at Skúvoy er elsta kirkjubygd í landinum. Men Føroyingasøga er skrivað [illegible] seinni enn hendingarnar og kann ikki [illegible] at vera álítandi søgulig heimild. Í Kirkjubø hevur helst verið kirkja fyri ár 1100.

Føroyingasøga

Eitt sindur eftir 1100 eru Føroyar skipaðar sum bispadømi. Tað merkir, at fyri ta tíð hevur landið verið tað, vit plaga at nevna eitt missiónsumráði og kirkjan sostatt ein missiónskirkja. Eftir Føroyingasøgu plaga vit at siga, at Føroyar verða kristnaðar ár 1000. Við kristningini av fólkinum í Føroyum man hetta hava verið so sum so. Sigmundur letur Trónd sleppa at velja, um hann vil verða dripin ella lata seg doypa. Tróndur velur lívið. Sigmundur tekur Trónd við sær umframt prestar og ferðast kring landið og doypir fólkið. Men [illegible] at doypa fólkið og [illegible] er at læra fólkið [illegible] sum tað [illegible] norðurlendskum [illegible]

Adam úr Bremen

Ein onnur tíðindakelda enn Føroyingasøga er megnarverkið hjá Adami úr Bremen, sum er skrivað í 1073. Hann skrivar um Danmark, Sviaríki og Noreg. Hann kennir eisini Ísland og Orknoyggjar, sum saman við Hetlandi var eitt bispadømi, men nevnir ikki Føroyar Tá hann ikki nevnir Føroyar, má tað vera tí, at hann ikki kennir tær ella, at hann hevur kent navnið, men ikki landið. Og hvussu ber tað til, at hann ikki kennir Føroyar, tá ið hann kennir bæði grannalond okkara? Eftir mínum tykki man grundin til tess vera at Føroyar ikki vóru bispadømi, tá ið hann skrivar. Ísland fekk sín fyrra bisp í [illegible], tá bert 17 ár, áðrenn Adam skrivar sína bók. Orknoyggjar kennir [illegible] har búði bisp[illegible] og Hetland. [illegible] í Bremen, [illegible] í Bremen [illegible] Norður[illegible] Norðurlond [illegible]. Tí er hann væl [illegible] við allar tær skipaðu kirkjurnar, tað merkir tær kirkjur, sum vórðu skipaðar sum bispadømi um hetta mundið. Og tað vóru Føroyar ikki fyrr enn seinni, helst um sama mundið sum Norðurlond vórðu skipað sum erkabispadømi fyri seg við erkabispi í Lund í núverandi Svøríki, táverandi Danmørk, og hetta hendir í 1103 ella 1104.

Føroyar bispadømi

Tá Føroyar ikki eru bispadømi fyrr enn eftir 1100 merkir tað, at landið alt 1000-talið ikki hevur havt eina skipaða kirkju. Og tað er í árunum eftir at bispadømi er sett á stovn, at farið er undir at leggja kirkjuviðurskiftini í fasta legu, til dømis at býta landið sundur í sóknir og byggja kirkju í hvørjari sókn. Vit vita, at í Føroyum sum [illegible] hava verið fleiri kirkjur fyri trúbótina enn eftir og tí hava annaðhvørt verið fleiri sóknir í katólskari tíð ella — og tað er helst trúligari — at tað hava verið fleiri kirkjur og fleiri sløg av kirkjum í hvørjari sókn. Møguligt er, at býtið av landinum í sóknir er eldri enn kirkjan, og at kirkjan tí hevur skipað seg eftir hesum gamla býtinum. At kirkjur hava verið fyri 1000 er einki at ivast í, men at kirkjur eru komnar eftir 1100 um alt landið er víst. Tað var ein partur av kirkjuskipanini.

Tórshavn

Eg dugi ikki at síggja, at nakað er til hindurs fyri, at Havnin sæð frá einum kirkjuskipanar- ella søguligum sjónarmiði, er vorðin kirkjubygd líka so tíðliga sum nógvar aðrar bygdir. Men lat tað verða sagt einaferð enn: vit vita tað ikki. Men vit vita heldur ikki um eina einastu aðra bygd í Føroyum, sum er vorðin kirkjubygd eftir 1100, nær hon er vorðin tað. Eitt annað, sum kann benda á, at Havnin tíðliga er vorðin kirkjubygd er, at í allarflestu førum gongur leiðin millum bygdir í somu sókn [illegible] við sjónum. Í hvussu so er ikki upp um fjall: Hoyvík, Havn, Argir.

Var eingin kirkja í Havn í miðøld?

Í síni frálík bók um Havnar kirkju frá 1965 sigur Sverri Dahl, at eingin kirkja hevur verið í Havn í miðøldini, »tað vit vita«. Og eitt sindur longur frammi: »Ið hvussu er, varð elsta kirkjan, sum vit við vissu hoyra um, bygd har — (t.e. í Havn) — í

➡